TOYOTA

## Lærlingur til eykalutagoymsluna

Til eykalutagoymslu okkara, ið er ein av mest framkomnu í landinum, sóknast vit eftir einum lærlingi at byrja skjótast tilber.

Talan er um eitt lærupláss í einum áhugaverdum og avbjóðandi yrki, ið gevur tær prógv innan handilsyrkið við bilum sum sergrein.

Arbeiðsuppgávurnar spenna víða og geva fatan og innlit í mekaniska, eins væl og tekniska partin av nýmótans bilasmíði.

Lærutíðin er 3 ár um tú hevur FHS prógv og 2 ár, um tú hevur HH prógv.

Lønarviðurskiftini er sambært galdandi sáttmála.

Eru spurningar til starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Frits Joensen ella Eivind av Reyni. Umsóknir skulu skjótast tilber sendast til:

Reyni Service
Goymslulærlingur
Vegurin langi
188 Hoyvík

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

TEAM85

Lesið Sosialin -so eru tit við!

## KOM OG ARBEIÐ Á DEKKSENTRINUM

**Søkt verður eftir einum røskum manni. Talan er um fast arbeiði á dekkverkstaði í Tórshavn**

**Vit vænta av tær, at :**

· tú ert fyrikomandi og kundavinarligur
· kanst arbeiða sjálvstøðugt - eisini tá harðast leikar á
· ert framsøkin og hugaður at menna virksemið okkara
· hevur teldukunnleika á brúkarastøði.

**Vit bjóða tær :**

· fast arbeiði
· góða løn
· eitt fjølbroytt arbeiði, har tú kemur víða um í fyritøkuni.

Vit bíða spentir eftir tær.
Send okkum nøkur orð um teg sjálvan.
Teldupostur: gunnar@dekk.fo
Ella send okkum eitt bræv :
**Dekksentrið** - Postsmoga 3077- 110 Tórshavn
Meira fæst at vita um starvið á tlf. 210500 ella 219828

DEKK SENTRIÐ

www.dekk.fo



TEAM85

# Handilsleiðarar

Starvið sum handilsleiðari í sølubúðini í Runavík og starvið sum handilsleiðari í sølubúðini í Klaksvík verða við hesum lýst leys. Starvið í Runavík skal setast tann 15. november ella skjótast tilber. Starvið í Klaksvík skal setast tann 15. januar ella skjótast tilber.

**Um sølustøðini**

Virksemið er í høvuðsheitinum smásøla í handilinum og stórordrar til skeinkistøð, veitslur v.m. Vørumóttøka og avskiping av fløskum er harafturat ein partur av virkseminum.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitinum**

- Leggja til rættis og samskipa arbeiðið í handilinum
- Bíleggja vøru
- Ymiskt eftirlit og avstemmingar
- Starvsfólkamál og menning
- Kundaráðgeving

**Um starvið**

Tú hevur dagliga ábyrgd av handilinum, at hesin verður rikin sambært innanhýsis mannagongdum og sambært lógum og reglugerðum fyri Rúsdrekkasølu Landsins. Eisini ert tú bindilið millum handilin og høvuðsumsitingina. Arbeiðsbyrðan er skiftandi bæði hvat viðvíkjur árstíð og dagar í vikuni. Tað er tí umráðandi, at tú dugir at leggja arbeiðið tilrættis.

Starvið er í nógvar mátar krevjandi bæði fysiskt og mentalt, men samstundis mennandi fyri rætta persónin.

**Um persónin**

Tú hevur góð evni at samstarva, ert fyrikomandi, motiverandi og røkin. Eisini vænta vit, at tú hevur hug og evnir at seta teg inn í nýggj viðurskifti, bæði tá tað snýr seg um vørur og rakstur av einum handli sum hesum.

**Førleikakrøv**

Handilsútbúgving ella líknandi saman við kunnleika til bókhald og KT.
Førleikakrøvini stytta um upplæringina, men eru ikki ein treyt fyri setan. Vit rokna við, at uttan mun til royndir og námsfrøðiligan førleika, er ein ávís upplæring neyðug fyri at røkja starvið.

**Setanartreytir**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið og er flokkað í lønarflokki 4.

Umsóknarfreistin er tann 12. oktober 2006
Tilskilast má í umsóknini, hvørja deild, søkt verður til. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jógvan Jacobsen, rakstrarleiðara, tel. 31 42 77.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til:

**Rúsdrekkasøla Landsins**
Postsmoga 3069
Tórshavn Tel. 31 42 77
Att.: Elsa Maria Holm Olsen, stjóri

*Rúsdrekkasøla Landsins*
*Hoyvíksvegur 51 Postboks 3069 FO-110 Tórshavn*
*Tel (+298) 31 42 77 Fax (+298) 31 22 60*